## BRENNIR TÚ FYRI KOPPUM, GRÝTUM OG KANNUM?
– SO HAVA VIT STARVIÐ

Maria Poulsen Búnýti søkir eftir einum starvsfólki vegna barnsburðarfarloyvi. Vit sóknast eftir einum dugnaligum starvsfólki, ið hevur áræði og eina vinarliga atferð. Rætta starvsfólkið kennir týdningin av at veita eina góða tænastu til kundar okkara, og skal kunna taka ábyrgd og klára at arbeiða sjálvstøðugt.

Tað er til fyrimuns, um tú hevur royndir frá handli ella líknandi ella hevur eina viðkomandi útbúgving. Starvssetan er frá 1. juni 2009.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Súsannu á Dul, leiðara, á telefon 312 001.

Skrivlig umsókn saman við próvskjølum, CV o.ø. skal vera okkum í hendi **20. apríl 2009 kl. 12.00.** Umsóknin skal sendast til:

**MARIA POULSEN BÚNÝTI**
Tórsgøta 10
Postboks 182
110 Tórshavn




**Maria Poulsen Búnýti**

Tel 312 001 | Fax 314 657 | bunyti@mariapoulsen.fo



## Fíggjarleiðari til KJ Hydraulik PF

Søkt verður eftir fíggjarleiðara til KJ Hydraulik PF. Fíggjarleiðarin skal hava ábyrgd av fíggjarligu viðurskiftum felagsins og tískil syrgja fyri góðum yvirliti og rapportering yvir rakstur og fíggjarstøðu fyri, saman við leiðslu, til eina og hvørja tíð at hava fingurin á pulsinum og møguleika til í góðari tíð at gera tillagingar. Eisini hevur fíggjarleiðarin um hendi leiðslu av umsiting , sum pt. er samansett av bókhaldara, tveimum skrivstovufólkum og einum næmingi.

**Førleikakrøv**
Rætta fólki til starvið:
- er útbúgvin Cand. Merc, HD, merkonom ella líknandi
- hevur góð samstarvsevni og evni at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur royndir frá privata ella almenna arbeiðsmarknaðinum innan fíggjarvirksemi
- hevur hollan kunnleika til føroyskt, danskt og enskt mál, bæði í skrivt og talu

Arbeiðsplássið er á høvuðsskrivstovu felagsins á Kambsdali.

**Løn og setanartreytir**
Miðað verður ímóti at seta starvið 1. mai 2009, ella eftir nærri avtalu. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Ólav Asafsson Olsen á tel 588817, ella á teldupostі oao@kj.fo.

Umsóknir saman við prógvum, C.V. og øðrum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 14. apríl 2009. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu sendast til:

**KJ Hydraulik PF**
**att: Ólavur Asafsson Olsen**
**535 Kambsdalur**

Ella við neyðugum fylgiskjølum til teldupost oao@kj.fo

KJ er ein fyritøka við serkunnleika innan hydraulik og maskintøkni. Fyritøkan veitir og serviserar útgerð til fiskiídnaðin, alivinnuídnaðin á sjógvi og landi, umframt flutningsvinnuna og byggivinnua. Sum ein av størru fyritøkunum á maskintekniska økinum í Føroyum, veitir KJ eisini útgerð og tænastur til útlendskar marknaðir, eitt nú til Íslands, Skotlands, Hetlands, Grønlands, Danmarkar og Noregs. Í løtuni starvast 55 fólk hjá KJ Hydraulik.

**KJ HYDRAULIK** POWER & MOTION CONTROL

Postsmoga 110 · Kambsdalur · Tel 407 000 · Faks 407 001 · www.kj.fo

# Føroya Handilsskúli á Kambsdali søkir eftir LÆRARUM

at undirvísa á HH og FHS frá 1. august 2009. Hevur umsøkjari útbúgving, sum nøktar fleiri lærugreinir, kann talan gerast um fast starv. Samanlagt er talan um átta fulltíðarstørv.

**Lærarastørv** (5 fulltíðarstørv)
Altjóða búskapur B, Dekoratión C, Enskt C, Føroyskt A/C, Marknaðarsamskifti C, Marknaðarførsla C, Samfelagslæra C, Sálarfrøði C, Støddfrøði B/C, Sølubúskapur B, Vinnulívsrættur C, Virkisbúskapur A/B

**Avloysarastørv** (3 fulltíðarstørv)
Danskt A, Enskt A/B, Føroyskt A/C

### Arbeiðsuppgávur
- undirvísa í viðkomandi lærugreinum
- leggja til rættis undirvísingargongdir
- luttaka í toymisarbeiði
- vera við í ráðlegging skúlans
- luttaka í verkætlanum, sum skúlin skipar fyri

### Vit vænta, at tú
- hevur viðkomandi útbúgving á kandidatstigi ella aðra hægri útbúgving saman við serfrøðingavitan til lærugreinir á A- og B-stigi.
- hevur viðkomandi útbúgving á bachelor-stigi ella aðra hægri útbúgving saman við serfrøðingavitan til lærugreinir á C-stigi.
- hevur áhuga í undirvísing
- dugir væl at samstarva og samskifta
- vilt vera við at menna skúlan
- ikki ræðist nýggjar avbjóðingar

### Vit kunnu m.a. bjóða
- eitt fakligt mennandi umhvørvi
- eftirútbúgvingarmøguleikar
- góðar arbeiðsumstøður
- ein spennandi og lívligan gerandisdag

### Løn
Lærarar verða løntir eftir sáttmála millum Lærarafelag Handilsskúlans og Fíggjarmálaráðið.

### Umsókn
Umsóknin skal stílast til Føroya Handilsskúla og sendast til Føroya Handilsskúla á Kambsdali, Dalsvegur 1, 530 Fuglafjørður. Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 17. apríl 2009. Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Páll Isholm, deildarstjóra, á telefon 444900/219930 ella pall.isholm@skulin.fo

FØROYA HANDILSSKÚLI

Føroya Handilsskúli á Kambsdali | Dalsvegur 1 | FO-530 Fuglafjørður
Tel. +298 444900 | Faks 444901 | www.fhk.fo | fhk@skulin.fo

**Um skúlan:**
Á Føroya Handilsskúla á Kambsdali eru vit 400 næmingar og 40 starvsfólk. Vit fyriskipa og taka FHS og HH útbúgvingarnar, fjarlestur, ítróttarbreyt, akademimerkonom og skeið. Vit stremba til eina og hvørja tíð eftir at virði skúlans dygd, opinleiki, virðing og framfýsni eyðkenna alt virksemi skúlans.

VESTA